FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Náttúruvísindadeildin

Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á NÁTTÚRUVÍSINDADEILDINA (NVD) Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við upptøkuni til bachelorútbúgvingina í KT-verkfrøði. Vit vóna og vænta, at tú fært nøkur góð, lærurík, kveikjandi og mennandi ár á Setrinum.

**Felags innleiðsla**

Felags innleiðsla fyri tey nýggju lesandi á øllum Setrinum verður

**Mánadagin 19. august 2024 kl. 09.00-11.00 í**
**Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum á Vestaru bryggju 15**

Aftaná verður farið á Náttúruvísindadeildina, ið eisini húsast í Sjóvinnuhúsinum.

**Lestrarbyrjan**

Hósdagin 22. august byrjar undirvísingin. Hendan dagin byrjar skeiðið *Algoritmur og datastrukturar* kl 9.00, sum tit koma at taka saman við 2023-árganginum. Nærri kunning um høli og undirvísing kemur seinni.

**Skeið og lærubøkur**

Fyrsta hálvárið verða fýra skeið.

Í tíðarskeiðnum 22. august til uml. 25. oktober, 2024, vera hesi bæði skeiðini:

- Innleiðing í teldufrøði (týsdag og fríggjadag)
- Algoritmur og datastrukturar (mánadag og hósdag)

Undirvísing er vanliga mán-frí, kl. 9.00 til 15.00, burtursæð frá mikudøgum, ið vanliga eru avlagdir til heimauppgávur, egnan lestur, bólkaarbeiði, o.t.

Lærubøkurnar til nevndu skeið eru:

- *Computer Science: An Overview* - Glenn Brookshear, Dennis Brylow
  Prentice Hall; 13. Edition ISBN-13: 9780134875460
  https://www.amazon.com/Computer-Science-Overview-13th-Whats/dp/013487546X/ref=sr_1_1?crid=13KUXHS5DM9WZ&keywords=ISBN-13%3A+9780134875460&qid=1687881042&sprefix=isbn-13+9780134875460%2Caps%2C246&sr=8-1

- Introduction to the Design and Analysis of Algorithms: International Edition, Anany V. Levitin, Pearson, 3rd Edition, 2014
  Introduction to the Design and Analysis of Algorithms: International Edition eBook : Levitin, Anany: Amazon.co.uk: Kindle Store

*Gev gætur!* Fyri at koma so væl í gongd sum gjørligt, er týdningarmikið at tú hevur neyðugu lærubøkurnar tøkar frá byrjan av lestrarárinum. Tey lesandi bíleggja sjálvi sínar lærubøkur frá bókahandlum ella online. Vit mæla til, at tú gert hetta í góðari tíð, tí í onkrum føri kann tað taka nakað av tíð at fáa bøkurnar til Føroya. Tað er umráðandi at eftirkanna ISBN við bílegging, tí nevndu bókaheiti fáast í fleiri ymiskum variantum.

…  …  …  …  …  …  …

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar í omanfyristandandi ætlan kunnu koma fyri. Um størri broyting kemur, verður kunnað um tað seinni.

Vælkomin til eina spennandi útbúgving á Náttúruvísindadeildini. Vit gleða okkum til at síggja teg.

Vinarliga heilsan,

***Náttúruvísindadeildin***
Hilmar Simonsen, útbúgvingarleiðari fyri KT-verkfrøði og Diplom í web-menning
T: HilmarS@setur.fo
F: 292557

# Skrá fyri innleiðsluna á Náttúruvísindadeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**
Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 | Skráseting (lesandi fáa lestrarkort og kunningarmappu) |
| kl. 09.15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| kl. 09.25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| kl. 09.30 | Tónleikur |
| kl. 09.45 | Røða |
| kl. 10.00 | Básar á Svalanum |

*Lesandi fara út á deildirnar.*

| | |
|---|---|
| kl. 11.10 | Dekanur bjóðar vælkomin |
| kl. 11.20 | Lestrarráðsforfólkið, kunnar um Lestrarráðið |
| kl. 11.30 | Lestrarvegleiðarin, Kirstin S. Rasmussen, kunnar um lestrarvegleiðingina |
| kl. 11.40 | Myndatøka |
| kl. 11.50 | Ábit |
| kl. 12.40 | Starvsfólk og nýggj lesandi presentera seg fyri hvørjum øðrum og greitt verður frá lestrinum |
| kl. 13.00 | Rundvísing í Sjóvinnuhúsinum |
| kl. 13.40 | Liðugt |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

Hendan dagin møta tit kl 9:00 og eru saman við tykkara árgangi. Mentorar skipa fyri samansjóðandi tiltøkum, síðan verður felagsmáltíð og undirhald.

**Hósdagin 22. august**

Undirvísing í *Algoritmur og datastrukturar* (bert KT-verkfrøðingarnir)

**Fríggjadagin 23. august á Námsvísindadeildini**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 20.00-02:00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |